# Heimsins mest framkomna boriskip bora við Føroyar

**-Vit ætla at halda tað vit hava lovað og sett okkum fyri, nevniliga at bora á landgrunninum í ár sigur Peter Rattey, stjóri hjá BP, sum í næstum skal undirskriva sáttmála við Smedvig um boriskipið West Navion**

OLJULEITING
*Jan Müller*

Tað verður eftir øllum at døma norska boriskipið West Navion, sum fer at bora fyri BP á landgrunninum í heyst. Hetta váttar Peter Rattey, stjóri í BP fyri Sosialinum. Hann hevur júst verið í Føroyum saman við "Føroyabólkinum" hjá BP, ið telur ikki færri enn 35 fólk. Tey hava hildið arbeiðsfundir í Havn, og hava so eisini vitjað skúlar fyri at greiða frá virkseminum hjá BP í Føroyum. Peter Rattey, sum stendur á odda fyri leitingini hjá BP í hesum partinum av heiminum, hevur eisini vitjað í Runavík fyri at síggja umstøðurnar har. Hóast har ikki var so nógv at síggja, so ivast hann onga løtu í, at klárt verður til boringarnar.

Hóast sáttmálin ikki varð undirskrivaður seinnapartin hósdagin, tá vit hittu Peter Rattey, so kann hann við nærum fullari vissu siga, at BP fer at bora í ár og harvið halda seg til tað teir hava lovað.Tað hevur alla tíðina verið ætlanin hjá BP at bora við Føroyar í ár, og tað ætla teir at halda. Tá boripallurin, Jack Bates, sum varð ætlaður at brúka við Føroyar, mátti takast úr hesi ætlanini og setast til at bora víðari á Schiehallionleiðini fyri harvið at kunna økja um framleiðsluna, kom ein ávís óvissa fram um, hvørt BP fór at finna nakran avloysara fyri Jack Bates.



*Peter Rattey, sum stendur á odda fyri leitingini hjá BP við Føroyar her saman við Hjarnari Djurhuus, stjóra hjá BP í Føroyum*

*Mynd Jan Müller*

– Vit hava alla tíðina leitað eftir øðrum pallum, og hava so eisini havt eyguni eftir West Navion, sum nú eftir øllum at døma fer at bora Svínoyar-pro - spektið í august. Vit eru eisini ómetaliga glaðir um at kunna brúka hetta sera effektiva og nútímans boriskipið, tí tað gevur fleiri fyrimunir framum ein vanligan boripall. Skipið er sera vælegnað til júst hesa boringina og er tað gjørt út til at lúka norsk krøv og reglur. Tað ger tað eisini lættari fyri føroyskar myndugleikar. West Navion borar í løtuni vestan fyri Írland og skal eftir tað til at bora tveir brunnar vestan fyri Hetland fyri Conoco og BP. Tá hesir brunnar eru boraðir kemur skipið inn í føroyska sjógv og fer til arbeiðis her.

*Sera væl útgjørdar boriskipið West Navion, sum nú eftir øllum at døma fer at bora fyri BP á landgrunninum í august*



### Framleiða í 2003

Við teimum mongu hentleikum eitt vælútgjørt og nútímans boriskip sum West Navion hevur, kann BP longu móti endanum av september mánað siga, hvønn veg tað ber, um úrslitið er gott ella ikki. Og vísir tað seg, at BP treffir við olju beinanvegin, er ætlanin at taka ein av pallunum, sum verða nýttir í Meksikanska Flógvanum, til Føroya at gera tær víðari boringarnar. Tað merkir, at teir fara at bora tveir framleiðslubrunnar og ein "injector" brunn á sumri 2002. Gongst alt hetta eftir bókini kann BP fara undir fyrstu framleiðsluna frá Svínoyarkelduni longu við ársenda 2003 ella á sumri í 2004. Ætlanin er at hava fulla ferð á framleiðsluni í 2006. Peter Rattey dylur ikki fyri, at BP sær tað sum sína uppgávu – finna teir olju við Føroyar - at fara í gongd við at fyrireika framleiðslu sum skjótast. Teir fara tí at raðfesta menning av eini føroyskari oljukeldu sera høgt. Tað hevur týdning fyri BP at fáa framleiðsluna í gongd skjótast, eins og tað hevur týdning fyri føroyska landskassan at fáa skattapengar inn frá oljuni leggur hann aftrat. (Lesið meira um ætlaninar hjá BP á bretskum og føroyskum øki í næstu viku, blaðm.)



*BP fólk undirvísa sjómansskúlanæmingum*

*Mynd Jens K Vang*